# Menningartarnað á Háskúla

TÍÐINDASKRIV

Í hesum døgum er skeið fyri fólk við menningartarnði á Føroya Háskúla. Hetta er annað árið á rað at tílíkt skeið verður hildið.

Lærarnir á Háskúlanum undirvísa í handaligu lærugreinunum: smíð, tilevning, drama og teldufrálæru.

Pedagogar og pedagoglesandi undirvísa í bólkum har tey menningartarnaðu arbeiða við spurningum sum hava við teirra egnu lívsstøðu at gera.

Í hesum sambandinum stinga nógvir spurningar seg upp, spurningar sum tey menningartarnaðu hava hug at fara víðari við.

Tískil verður skipað fyri einum almennum pallborðsfundi. Politisku flokkarnir senda eitt umboð hvør, og háskúlanæmingarnir fáa høvi at seta teimun, teir spurningar tey hava arbeitt seg fram til, á skeiðnum.

Vit eru fegin um at landstýrismaðurin í almannamálum hevur játta at koma.

Pallborðsfundurin verður almennur og verður á Háskúlanum mikukvøldið 27. oktober kl. 19.30.

# Býlingshús í Maritugøtu



TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 22. oktober var stór almenn móttøka í Býlingshúsinum í Maritugøtu í Hoyvík.

Nógv fólk vóru møtt til móttøku, Jan Christiansen, borgarstjórið og Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini fluttu fram røður. Malan Thomsen sang fyri børnunum.

Býlingshúsið í Maritugøtu er tann 12 í røðini av nýggjum stovnum, ið eru settir á stovn við tilsamans 580 plássum, í hesum valskeiðinum, og tríggir aðrir eru á veg. Bara í hoyvíkshaganum eru tríggir stovnar latnir upp seinasta hálvtannað árið. Tann fjórði, sum verður bygdur omanfyri Mylnutjørn, letur upp um tvey ár.

Í Býlingshúsinum í Maritugøtu eru í dag tríggjar vøggustovur við 12 børnum í hvørjari stovu.




Vika 44, 2004
www.kaupthing.fo

# Oljan framhaldandi størstu ávirkan

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku var tað enn einaferð var tað oljuprísurin, sum setti dagsskránna. Hesuferð tó eitt sindur øðrvísi enn áður, tí hann umsíður lækkaði úr 50 í 48 dollarar. Teir íleggjarar, ið hildu, at lækkingin fór at halda áfram, gjørdust tó vónbrotnir. Prísurin á Brent oljuni hækkaði skjótt aftur, og kom fríggjadagin upp um 51 dollarar fyri tunnuna. Sum áður, tá oljuprísurin er hækkaður, lækkaðu renturnar. Eisini partabrøv vóru undir trýsti.

Lyklatølini úr USA í farnu viku vóru fyri tað mesta góð. Prísvøksturin, uttan orku og matvørur, hækkaði. Samstundis vóru vikuliga arbeiðsloysistalið og vinnuálitið fyri Philadelphia bjørt. Í Evropa vóru tølini eitt sindur daprari. Prísvøksturin, ídnaðarframleiðslan og franska privatnýtslan lækkaðu, og framleiðsluprísirnir hækkaðu. Tó var ein glotti í, at vøksturin í nýggjum ídnaðarordrum var væl størri enn væntað.

Hesa vikuna koma fleiri áhugaverd lyklatøl úr USA. Mikudagin kunnger FED metingar um búskapin í ymsu statunum. Fríggjadagin koma tøl fyri BTÚ og privatu nýtsluna fyri 3. ársfjórðing. Sum heild verður væntað, at hesi tøl fara at vísa framgongd í mun til 2. ársfjórðing. Í Evropa fer vikan fyri tað mesta at snúgva seg um prísvøkstur, tí prísvakstrartøl verða kunngjørd fyri ES, Týskland, Frankaríki, Italiu og Spaniu.

Roknskapirnir, ið vóru kunngjørdir í farnu viku, vóru ójavnir. Bæði IBM og Texas Instruments kunngjørdu góð tøl. Tað sama gjørdi Ericsson, men teirra framtíðarmetingar vóru ivasamar. Roknskapurin hjá Motorola var sum heild vánaligur.

Eftir at Svenski Handilsbankin í farnu viku kunngjørdi góðan roknskap, vænta vit, at Danske Bank og Nordea hesa vikuna eisini fara at kunngera hampuligar roknskapir. Eisini Novo Nordisk kunngerð hesa vikuna. Partabrævavikan, sum heild, fer kortini at vera stýrd av gongdini í oljuprísinum.

Hóast bæði rentur og partabrøv eru lækkaði heldur nógv seinastu dagarnar, so stimbrar áhaldandi høgi oljuprísurin verandi gongd.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,38% | -0,04% |
| 5 ára lánsbræv | 3,24% | -0,07% |
| 10 ára lánsbræv | 4,13% | -0,08% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 275,2 | -1,6% |
| OMX, Svøríki | 690,9 | -3,0% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.739,9 | -1,1% |
| S&P 500, USA | 1.095,7 | -1,1% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,60 | -1,2% |
| Evru Lánsbrøv | 169,24 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 83,57 | -0,3% |
| Altjóða Vøkstur | 58,82 | 0,0% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 581,69 | -2,4% |
| EUR | 743,51 | 0,0% |
| GBP | 1.070,88 | -0,4% |
| NOK | 90,43 | -0,1% |



# Italskt samstarv um studentar og gransking

**Rektarin á Fróðskaparsetrinum afturkomin úr Italia við tveimum samstarvsavtalum og studningi til fimm studentar at læra italskt**

TÍÐINDASKRIV



*Burturúr vitjanini í Italia komu ikki minni enn tvær samstarvsavtalur*

Malan Marnersdóttir, rektari, var í døgunum frá 10. oktober til 15. oktober boðin til Italia at vitja á Universitetinum í Calabria, sum heldur til í býnum Cosenza og á Akademinum LALEO (Libera Accademia delle Lingue Europee ed Orientali, sum merkir frælsa akademii fyri evropeisk og orientalsk mál) í bygdini Santa Severina. Burturúr hesi vitjan eru komnar ikki minni enn tvær samstarvsavtalur.

Avtalurnar eru sonevnd 'Letter of Commitment' og 'Letter of Intent', sum eru vanligar samstarvsavtalur millum evropeisk universitet. Fróðskaparsetrið hevur frammanundan avtalu við Háskóla Íslands og Høgskolen í Stavanger í Noregi.

Í báðum avtalunum verður staðfest, at ætlanin er at samstarva um gransking og útbúgvingar. Endamálið er at fáa í lag skifti av næmingum, granskarum og granskingarúrslitum millum stovnarnar.

Calabria og Føroyar hava millum annað fisk sum felags áhugamál. Í avtaluni er nevnd ætlan um at samstarva innan gransking og undirvísing í evninum fiskafólk og fiskahagreiðing. Harafturat hava báðir italsku granskingarstovnarnir stóran áhuga - eins og Fróðskaparsetrið - fyri málpolitikki, og herundir serliga støðuni hjá fámentum málum. Í Calabria eru fleiri fáment mál, sum serliga Akademiið í Santa Severina granskar.

### 5 námstudningar til føroyingar

Heim við sær úr Italia hevur Malan Marnersdóttir, rektari, eisini fingið tilsøgn frá LALEO um studning til at fimm føroyskir studentar kunnu koma til Italia at læra seg italskt mál og mentan. Tey veita skúla og innivist, føroysku studentarnir skulu sjálvir gjalda fyri ferð og útreiðslur til annað uppihald enn gisting.

Á ferðini helt Malan Marnersdóttir fyrilestrar fyri italsku vertunum um Fróðskaparsetrið, føroyskt mál og føroyskar bókmentir. Italsku vertirnir greiddu frá, at Universitetið í Calabria er stovnað fyri 30 árum síðani við tí fyri eyga at menna økið, har suðuri í Italia, sum var tiltikið tilafturskomið. Royndirnar vísa, at fólk eru farin at støðast betri í økinum og at økið hevur verið fyri sosialum framburði. Serliga sæst hetta sambært universitetinum aftur í at mafian, sum annars hevur verið sterk har suðuri í Italia, ikki hevur so góðar fastatøkur á fólki longur.

Upprunin til vitjanina hjá Maluni Marnersdóttir í Italia og nýggja samstarvið, er at finna í nýggju føroysku-italsku orðabókini hjá Gianfranco Contri. Ein av teimum, sum hjálpti Gianfranco var Cesare Pitto, professari í søgu. Hann fekk skipaði fyri, at rektarin á Universitetinum í Calabria sendi innbjóðing til Fróðskaparsetrið um vitjan og samstarvsavtalu.

Tað næsta sum ferð at henda, er at Fróðskaparsetrið fer at lýsa við námsstudningunum til føroyskar studentar, og at granskararnir í Italia og á Fróðskaparsetrinum, fara at leggja til rættis, hvussu granskingarsamstarvið ítøkiliga skal fara fram.

## Stórhvalir í Vestmannasundið

Vakthavandi sigur, løgreglan fríggjamorgunin varð kunnað um, at stórhvalir vóru at síggja ímillum oyggjarnar.

Tá onkur so um middagsleitið ringdi inn á støðina og boðaði grindaboð, hevði løgreglan tí ein mistanka um, at talan var um somu stórhvalirnar.

Viðkomandi, sum ringdi, helt seg hava sæð eina grind í Vestmannasundið, men tá løgreglan kom á staðið, kundi hon staðfesta, at talan var um stórhvalirnar, sum spakuliga svumu har á leið. Teir fingu frið, og meiri varð so ikki gjørt við málið.

–eys–

## Trupulleikar av rúsdrekka

Fríggjakvøldið 22.10 kl 19.03 fekk løgreglan í Havn fráboðan um ein samanstoyt í rundkoyringini við Ringvegin. Ein bilur hevði rent í reyvina á einum øðrum, og tá løgreglan kom á staðið, kundu teir staðfesta, at førarin, ið hevði rent á, var ávirkaður av rúsdrekka.

Vakthavandi sigur, at tað annars hevur verið eitt friðarligt vikuskiftið í so máta. Trupulleikar hava staðist av seks ávirkaðum monnum, harav tveir komu inn á støðina at sova rúsin av sær.

–eys–

## 2 x Bilstuldur

Leygarnáttina kl 02.14 valdi løgreglan í Havn at steðga einum bili til tað, sum vakthavandi kallar eina rutinukanning.

Eftir eini løtu varð staðfest, at førarin var fullur, at hann einki koyrikort hevði og at hann hevði stolið bilin.

Bilurin var tikin á parkeringsøkinum aftanfyri sjónleikarhúsið í Havn og hevði ikki koyrt langt, tá hann varð steðgaður.

Vakthavandi sigur, at bilurin ongan skaða fekk. Hann var opin, og lyklarnir lógu í bilinum, so tað var lítið hóvasták av at stjala hann.

Vakthavandi sigur víðari, at løgreglan ofta má staðfesta, at føroyingar framvegis eru ov góðtrúgvnir, tá tað kemur til at lata lyklarnar liggja í bilinum.

Morgunin eftir kl 8.00 fekk løgreglan boð um ein annan bil, ið var stolin. Hesuferð av Frælsinum í Havn. Hann varð seinni funnin aftur í Sørvági. Einki var hent við bilinum, sum var í júst sama standi, sum tá hann varð settur á Frælsið fríggjakvøldið. Gerningsmaðurin varð í hesum førinum ikki funnin.

Vakthavandi sigur, at tað er ógvuliga sjáldan, at tveir bilar verða stolnir somu nátt, og at tað tí er sera nærliggjandi at hugsa, at gerningsmaðurin var tann sami í báðum førunum. Hetta er tó ikki staðfest enn.

–eys–

# SEV sett í verk bygnaðarbroytingarnar

**SEV-stýrið samtykti á fundi í dag at seta í starv tríggjar deildarstjórar sum liður í bygnaðarbroytingunum í el-felagnum, ið vórðu samtyktar á umboðsnevndarfundi í mars í ár**

TÍÐINDASKRIV
*frá SEV*

Fyrsta stigið at seta í verk bygnaðarbroytingarnar í SEV varð tikið í dag, tá SEV-stýrið samtykti at seta í starv tríggjar deildarstjórar, sum allir frammanundan hava verið deildarleiðarar í SEV. Bjarki Hermansen er settur sum deildarstjóri fyri framleiðsluna, tvs. el-verkini, Finn Jakobsen er settur sum deildarstjóri fyri býtisvirkini, tvs. el-netið, og John P. Danielsen er settur sum deildarstjóri fyri fyrisitingina.

Hesir tríggir mynda nú leiðsluna í SEV saman við stjóranum, Klæmint Weihe.

Frammanundan vóru tilsamans sjey deildarleiðarar undir stjóranum, men umboðsnevndin hjá í SEV samtykti á fundi 19. mars í ár at víðka leiðsluna við trimum deildarstjórum í staðin fyri teir sjey deildarleiðararnar.

Bygnaðarbroytingarnar bera m.a. eisini í sær, at ein starvsfólkadeild verður stovnað undir fyrisitingarstjóranum, og at ein menningareind verður knýtt afturat stjórnarskrivstovuni.



*Nýggju deildarleiðararnir saman við Klæminti Weihe, stjóra í SEV. Frá vinstru: Finn Jakobsen, Bjarki Hermansen, Klæmint Weihe og John P. Danielsen*